| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 13. desember 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 15/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2012 tann 13. desember kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 06. 2012 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. petersen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus S. Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Kristina Toftegaard Larsen hevði telefoniskt boðað borgarstjóranum frá, at hon kom at verða seinkað til fundin, við tað at hon fór úr Havnini kl. 16.30.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 50/2012.**

**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2013.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá Sigyurði S. Simonsen, borgarstjóra, dagfest 06. Desember 2012 við uppskoti um, at almennu býráðsfundirnir fyri 2013 verða hildnir niðanfyri standandi hósdgar kl. 16.30 í býráðshúsinum, hetta vísandi til §13, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri:
24. januar, 28. februar, 21. mars, 18. apríl, 30. mai, 20. juni, 29. august, 26. september, 31. oktober, 28. november og 12. desember.

**Avgerð:**
Uppskotið frá borgarstjóranum varð samtykt. (8-0).

**Mál nr. 51/2012.**

***Mál viðvíkjandi eykajáttan til viðlíkahald av Fuglafjarðar havn.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá havnanevndini, dagfest 09. oktober 2012 um eykajáttan til viðlíkahald av Fuglafjarðar havn fyri fíggjarárið 2012 við niðanfyri standandi grundgeving:

Í sambandi við ruddan av grótbrotinum á Brúnarenda, sum hevur kostað umleið kr. 600.000,00 og neyðuga asfaltering av oljubryggjuni og pelagosbryggjuni, verður mett, at samlaða meirnýtslan í 2012 verður umleið kr. 1,0 mió.

Eisini verður mett, at inntøkan av havna-, brúgva- og vørugjøldum kemur at verða umleið kr. 1,0 mió meira enn mett varð fyri árið 2012.

Vísandi til samtykt á fundi í havnanevndini 09. oktober 2012 verður tí heitt á fíggjarnevndina/býráðið um eina eykajáttan upp á kr. 1,0 mió. til viðlíkahald, sum mælt verður til verður fíggjað við mettari meirinntøku av havna-, brúgva- og vørugjøldum fyri árið 2012.

Á fíggjarætlanini fyri 2012 vórðu avsettar kr. 900.000,00 á rakstrarstaði 07.38.14.530.10 konto 160001 "Avseting leiga og viðlíkahald", og sambært yvirliti frá fíggjardeildini um nýtslu dags dato framgongur, at nýttar eru kr. 1.333.761,00 ella kr. 433.761,00 meira enn avsertt í fíggjarætlanini.

Hinvegin er staðfest, at inntøkurnar hjá Fuglafjarðar havn pr. d.d. hava verið kr. 7.660.797,00 móti mettum kr. 7.250.000,00 ella kr. 410.797,00 meira enn mett.
Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 19. november 2012.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá havnanevndini og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 1.000.000,00 til "Viðlíkahald av Fuglafjarðar havn" rakstrarstað 07.38.14.530.10 konto 160001, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Fíggingin verður fingin til vega av innistandandi peningi kr. 600.000,00 (avlop fyri roknskaparárið 2011), meðan írestandi kr. 400.000,00 verða fíggjaðar av meirinntøkum hjá Fuglafjarðar havn, rakstrarstaði 07.38.14.530.10 frá kontoum 216000-219201. Sí annars § 41, stk. 2 í omanfyri nevndu lóg.

Tá talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. viðgerð á býráðsfundi tann 30. november 2012 og varð einmælt samtykt at taka undir við tilmælunum frá havnanevndini og fíggjarnevndini og beina eykaháttanini til 2. og endaliga vigerð á býráðsfundinum 13. desember 2012.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at taka undir við tilmælunum frá havna- og fíggjarnevndini og veita Fuglafjarðar havn eina eykajáttan upp á kr. 1,0 mió. til ”Viðlíkahald av havnini” rakstrarstað 07.38.14.530.10 konto 160001. Eykajáttanin verður fíggjað av innistandandi peningi (avlop av rakststri fyri roknskaparárið 2011) við kr. 600.000,00, meðan írestandi kr. 400.000,00 verða fíggjaðar av meirinntøkum hjá Fuglafjarðar havn, rakstrarstaði 07.38.15.510.10 frá kontoum 216000-219201. (8-0).

**<u>Mál nr. 52/2012.</u>**

**Uppskot um broytan av avgerð býráðsins um útbygging av fóðurgoymsluni hjá Havsbrún.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá 5 býráðslimum, dagfest 31. oktober 2012 við uppskoti um at broyta avgerð býráðsins frá 26. januar 2012 um ætlaðu planering fyri fóðurgoymsluni hjá Havsbrún, soleiðis at hildið verður fast við, at keisíðan verður úr beinari linju frá Bergfrostbryggjuni og heim til fóðurbryggjuna.

Og onnur loyst verður funnin á goymslutørvinum.

Tá ið hetta mál er samtykt sum býráðsmál samtykti havnanevndin á fundi 21. november 2012, at hetta verður viðgjørt av býráðnum.

Skrivið frá teimum 5 býráðslimunum verður víst niðanfyri:

***Uppskot um broytan av avgerð býráðsins um útbygging av fóðurgoymsluni hjá Havsbrún.***

Undirritaðu býráðslimir loyva okkum hervið at leggja uppskot fyri býráðið um at broyta avgerðina, sum gjørd varð á býráðsfundi tann 26. januar 2012, um prinsipielt at tikið verður undir við, at útbygging av fóðurgoyumsluni hjá Havsbrún verður bygd sambært uppskoti 2.

Skotið verður ístaðin upp, at hildið verður fast við linjuføringina úr frystibryggjuni heim í mjølbryggjuna, og at avgerðin um at gera grótkast umleið 60 metrar út á fjørðin verður sett úr gildi.

Sambært uppskoti okkara verður møguleiki fyri hjá Havsbrún at gera eina fóðurgoymslu við eini breidd upp á 20 metrar omaneftir, og verður økið, sum gamla nótavirkið stendur á tikið við, verður hetta umleið 3.500 m2 tilsamans.

Ein beinur bryggjukantur gevur pening til havnakassan, meðan inntøkan, sum kommunan kemur at hava av einum grótkasti upp á umleið 3.200 m2 verður um 60.000,00 árliga. Um íløgukotsnaðurin verður kr. 14,0 mió, so tekur tað omanfyri 200 ár at fáa henda afturgoldnan í kommunukassan.

Sambært fyriliggjandi kostar ein bryggja á nevnda økið við eini longd upp á 106 metrar umleið tað sama sum grótkastið umleið kr. 14,0 mió., hetta sambært upplýsningum frá býarverkfrøðinginum.

Heitt verður á borgarstjóran um at leggja málið fyri fyrst komandi býráðsfund.

Dánjal Vang (sign), Jann Toftegaard (sign), Magnus S. Midjord (sign), Petur Abrahamsen (sign) og Sonni á Horni (sign).

*Viðgerðin og avgerðin á býráðsfundinum 26. januar 2012 varð henda:*

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Havsbrún, dagfest 11. oktober 2010 um byggiloyvi til ”fóðurgoymslu III” á økinum framman fyri tunnilsmunnan 60 metrar suður frá verandi fóðurgoymslu og 22,50 metrar heim frá bygninginum hjá P/F Bergfrost.

Havnanevndin boðar í skrivi, dagfestum 20. januar 2011 P/F Havsbrún frá, at umsóknin at byggja á økinum sunnan fyri verandi fóðurgoymslu ikki kann verða gingin á møti, men at kommunan saman við felagnum arbeiðir víðari við at finna aðrar loysnir.

Kommunan og Havsbrún hava síðan arbeitt víðari við hesum máli, og vísandi til fundarfrásøgn millum fyrisitingina og leiðsluna í Havsbrún tann 13. desember 2011, varð niðurstøðan tann, at Havsbrún tekur undir við, at bygt verður sambært "uppskoti 2", har fóðurgoymsla III verður bygd á øki, sum verður planerað uttan fyri verandi fóðurgoymslu.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 26. januar 2012 og var samtykt eftir tilmæli frá havnanevndini, at prinsipielt verður tikið undir við, at bygt verður sambært uppskoti 2 uttan at taka støðu til spurningin um fígging.

Málið varð sett á dagskrá til býráðsfund nr. 13/2012 tann 29. november 2012 sum nr. 6, men áðrenn fundurin byrjaði boðaði borgarstjórin frá, at hann hevði tikið avgerð um at taka málið av dagskránni. Grundgevingin varð, at ein av uppskotsstillarunum og stigtakari til skrivið Jann Toftegaard ikki varð á fundi.

Í sambandi við málið hevur tekniska deild kom mununar gjørt eina kostnaðarmeting við gerð av bryggju framman fyri verandi fóðurgoymslu hjá Havsbrún. Sambært skrivi, dagfest 06. desember 2012 verður mett, at atløgusíðan skal verða umleið 110 metrar í longd, soleiðis at koyrandi verður um sunnara húsahorn. Aftrat hesum er roknað, at spunsveggur verður settur niður umleið 17 metrar suðureftir fyri at sleppa undan at gera endavegg.

Samlaði spunsveggurin verður sambært hesum umleið 127 metrar. Grundað á kostnaðin á frystibryggju II, sum gjørd er í 2012, verður mett, at samlaði kostnaðurin av bryggjuni verður umleið kr. 19,5 mió.

**Avgerð:**
Uppskot frá borgarstjóranum um at útseta málið, grundað á at hildið verður rættast at hava fund við aktørarnar á havnarøkinum, áðrenn málið verður endaliga viðgjørt og avgerð tikin, varð samtykt. (7 atkv. fyri og 1 atkv. blonk. Blankt atkvøddi Jann Toftegaard)

**Mál nr. 53/2012**

**Umsókn frá Kaju og Jann N. Toftegaard um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 47b við Innandalsvegin.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Kaju og Jann N. Toftegaard, dagfest 18. november 2012 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 47b í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 04. desember 2012 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

Meðan hetta mál varð til viðgerðar og tilmæli gjørt varð Jann N. Toftegaard ikki á fundi.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndin varð samtykt. (9-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Jann Toftegaard ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 54/2012.**

**Umsókn frá Henny Abrahamsen um byggiloyvi til aftratbyggging.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Henny Abrahamsen, dagfest 10. oktober 2012 um byggiloyvi til afturatbygging til sethús hennara á matr nr 752. Toftanesveg 10 í Fuglafirði.

Sambært umsóknini verður bygt í mark móti matr. nr 753, og hevur eigarin Katrina Petersen hevur í skrivi dagf 20. august givið sítt viðmæli til, at bygt verður sambært fyriliggjandi ætlan.

Tá ið bygt verður nærri grannamarki enn 2,5 m hevur tekniska nevndin á fundi tann 04. desember 2012 viðgjørt málið sum eitt minni frávik til byggisamtyktina og mælir til at byggiloyvið verður givið, soleiðis at veggurin móti matr. nr. 753 verður gjørdur sum brandveggur úr betong uttan vindeyga ella op.

Eisini skal dekkið á yvirbygninginum verða gjørt úr betongog at alt takvatn skal verða á egnari grund.

Við tað at tekningarnar ikki eru nøktandi verður mælt til, at meira fullfíggjaár tekningar skulu fyriliggja, áðrenn byggiloyvið verður útskrivað.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 55/2012.</u>**

**Umsókn frá Sólgerð Andreasen um byggiloyvi til útistovu.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Sólgerð Andreasen um byggiloyvi til útistovu niðanfyri sethús hennara á matr nr. 700 á Gjógvaráveg 3 í Fuglafirði.

Tá ið bygt verður í mark vesturefrir móti matr. nr. 622a egari Heri Jøkladal er hetta sent honum til hoyringar. Hansara viðmerking er at hann ynskir, at einki vindeyga verður vestureftir.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 04. desember 2012 og verður mælt býráðnum til, at byggiloyvi verður givið soleiðis at veggurin vestureftir verður gjørdur sum brandveggur 30 cm upp um tekjuna, og at alt takvatn verður á egnari grund, tvs at einki úthang skal verða inn yvir matr. nr. 622a.

**Avgerð:**
Tilmæli frá tenisku nevndini varð samtykt. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.30.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus S. Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen